búnaðarstovan

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

12. mai 2023
Mál: 23/10894-5
Málsviðgeri: TGL

# Viðvíkjandi: Upprit til Uttanríkis- og vinnumálaráðið um skipanarreglur fyri virksemið á Búnaðarstovuni viðvíkjandi varðveitingararbeiðinum fyri Føroyska Rossið.

***Innihaldsyvirlit:***

Innleiðing: 2
Landbúnaðarstuðul: 2
Bráðhald: 2
    Vistarhaldsskipan: 2
    Keyp av alirossum: 2
Alimiðstøð við greðingastalli: 2
    Onnur føroysk húsdjórasløg: 3
Ílegugrunnur (biobanki): 4
Skrásetingarskipan: 4
Miðvís aling: 5
Íverksetanarætlan: 6
Fíggjarligt vavi: 6
    Íløgur: 7
    Árligar rakstrarútreiðslur: 7
Eftirskrift: 8

## Innleiðing:

Virksemið er kjølfest við støði í heimildarskrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, dagfest 14. januar 2021, (nú Uttanríkis- og vinnumálaráðið), har sagt verður: *Búnaðarstovan hevur landbúnaðarfakligu ábyrgdina av at varðveita serføroysku húsdjórasløgini og landbúnaðarvøksturin*.

## Landbúnaðarstuðul:

Búnaðarstovan umsitur vegna Uttanríkis- og vinnumálaráðið stuðulin á Løgtingsfíggjarlógini til varðveitingararbeiðið av føroyska rossaslagnum; *Føroyska Rossið*.
Umsitingin av stuðlinum er, sum nú er, skipað og nærri greinað sbrt. reglugerð frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

## Bráðhald:

**Vistarhaldsskipan:**
Búnaðarstovan hevur eina bráðskipan og vistartænastu tøka á Heygsgarði í Kollafirði fyri brádliga íkomnar neyðstøður; hetta er í eini roynd at bera soleiðis í bandi, at alidjór í stovninum av *Føroyska Rossinum* ikki verða geld ella avlívað o.s.fr. orsakað av brádliga íkomnum trupulleikum hjá eigaranum. Váttan krevst fyri, at rossið er skrásett í stovninum (stambókini) fyri *Føroyska Rossið*.
Fyri hesa vistarhaldstænastu ásetur Búnaðarstovan eitt dagligt gjald samsvarandi teimum útreiðslunum, ið standast av hesum. Gjaldsupphædd og treytir skulu vera tøkar hjá rossaánarum at kunna seg við frammanundan vistarhaldinum.
Partarnir undirskriva eina skrivliga vistarhaldsavtalu; egið skjal er um hetta.
Ross í vistarhaldi á Búnaðarstovuni eru framvegis ogn hjá tí, ið hevur latið tey í vistarhaldið, og viðkomandi kann altíð heinta rossið aftur sbrt. fráboðan og avtalu í vanligari arbeiðstíð.
Meðan rossið er í vistarhaldi hjá Búnaðarstovuni, eru tað einans røktarfólk stovnsins, ið varða av rossinum, og sum fyriskipa dagligari fóðring, røkt o.s.fr.
Eigari og/ella onnur viðskiftafólk skulu akta leiðbeiningar stovnsins. Verða hesar ikki hildnar, tilskilar Búnaðarstovan sær rætt til at siga vistarhaldsavtaluna upp við virknaði straks.
Búnaðarstovan miðar eftir, at røktin av rossunum altíð er á fakliga nøktandi støði og verður framd av dugnaligum starvsfólki við hóskandi førleikum. Búnaðarstovan hevur avtalu við djóralækna um eftirlit við heilsustøðuni hjá kríatúrunum á stovninum.

**Keyp av alirossum:**
Javnsett við vistarhaldsskipanina hevur Búnaðarstovan somuleiðis eina bráðskipan, har stovnurin keypir aliross fyri eina symbolska upphædd (framyvir kr. 5.000 pr. stk. – ið er uml. kjøtprísur) í eini roynd at fyribyrgja, at alidjór av týdningi fyri stovnin av *Føroyska Rossinum* verða geld ella avlívað o.s.fr. orsakað av brádliga íkomnum trupulleikum hjá eigaranum.
Partarnir undirskriva eina skrivliga keypsavtalu; egið skjal er um hetta. Viðkomandi ross er hereftir í allar mátar ogn hjá Búnaðarstovuni, ið síðani framyvir hevur fullan og óskerdan ræðisrætt á kríatúrinum.
Talan kann bert vera um keyp av rossum, ið, sambært meting Búnaðarstovunnar, hava týdning fyri stovnsrøktina og fyri aliarbeiðið av *Føroyska Rossinum*.
Ein fortreyt er, at talan er um ross, sum kunnu staðfestast at hoyra til stovnin *Føroyska Rossið*; antin við, at hesi longu eru eyðmerkt og skrásett í stambókaskránni hjá Felagnum Føroysk Ross, nú skrásett í talgildu skipanini Føroya Fongur, ella, at eftirfylgjandi eyðmerking og ílegukanning staðfestir bæði faðir- og móðirlegg í hesi skránni.
Búnaðarstovan ráðførir seg eftir tørvi við Felagið Føroysk Ross og við NordGen (Nordisk Genbank - Nordiskt Genresurscenter, sum er felags norðurlendski ílegugrunnurin á landbúnaðarøkinum), eins og við aðra viðkomandi serfrøði.

## Alimiðstøð við greðingastalli:

Til tess at leggja tryggar karmar undir varðveitingararbeiðið, mælir Búnaðarstovan Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til at taka undir við, at Búnaðarstovuni verður heimilað at skipa eina alimiðstøð fyri

*Føroyska Rossið* á Heygsgarði í Kollafirði; og, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið somuleiðis tekur undir við, at Búnaðarstovuni verður heimilað at taka við ábyrgdini av at umsita og at røkja stambókaskránna Føroya Fongur. Uppritið greinar hesi viðurskifti nærri.
Endamálið er at skapa og at skipa fortreytirnar fyri einum landbúnaðarfakliga grundaðum, skynsamum og munadyggum aliarbeiði, sum grundarlagi undir strembanini eftir at menna stovnin av *Føroyska Rossinum*.
Búnaðarstovan miðar eftir, at aliarbeiðið altíð er á fakliga nøktandi støði og verður framt av dugnaligum starvsfólki við hóskandi førleikum.
Virksemið verður skipað í samstarvi við eitt nú NordGen og t.d. Sveriges lantbruksuniversitet (SLU) [ið higartil hevur fyriskipað arvafrøðiligu kanningunum um *Føroyska Rossið*], eins og við m.a. Fróðskaparsetur Føroya. Búnaðarstovan ráðførir seg somuleiðis við Felagið Føroysk Ross eftir tørvi.
Búnaðarstovan tekur uppgávuna á seg at halda nóg stórt tal av greðingum til tess at tryggja eitt munagott grundarlag fyri einum nóg breiðum og tryggum arvafeingi; og sum kann viðvirka og stuðla arbeiðinum við "outbreeding".
Eigarar, ið lata ryssur ífola, skulu hava trygd fyri at kunna avhenda síni avvandu eitt ára gomlu hestfyl til alimiðstøðina hjá Búnaðarstovuni fyri somu upphædd, sum veitt verður í sambandi við bráðhaldsskipanina. Partarnir undirskriva eina skrivliga keypsavtalu; egið skjal er um hetta. Váttan krevst fyri, at rossið er skrásett í stovninum fyri *Føroyska Rossið*. Búnaðarstovan hevur síðani hereftir fullan og óskerdan ræðisrætt á kríatúrinum.
Sostatt verður ikki longur neyðugt hjá privatfólki at halda greðingar tøkar fyri at tryggja stovnsrøktina. Ein tílík trygd átti at stimbra munandi um hugin hjá privatfólki at taka virknan lut í aliarbeiðinum.
Búnaðarstovan miðar eftir, at røktin av rossunum altíð er á fakliga nøktandi støði og verður framd av dugnaligum starvsfólki við hóskandi førleikum.
Tað hevur týdning, at rossini á alimiðstøðini verða væl vand og somuleiðis nýtt sum brúksross, soleiðis at hesi, tá tey ikki longur eru av týdningi fyri aliarbeiðið, kunnu verða seld brúkarum, ið ynskja at nýta tey í antin rossaítróttini, sum arbeiðsross v.m. ella til matna.
Búnaðarstovan hevur avtalu við djóralækna um eftirlit við heilsustøðuni hjá kríatúrunum á stovninum. Greðingar, ið ikki longur hava týdning fyri alingina, verða geldir ella kunnu verða avlívaðir.
Búnaðarstovan lýsir ross, ið eru tikin úr aliarbeiðinum (t.v.s. geldir hestar og ryssur), til sølu, ávikavist sum brúksross ella til matna v.m.
Búnaðarstovan skipar umstøður í Heygshaga (ella í øðrum hagaparti ella lendi, sum avtala er gjørd við frammanundan) við hóskandi girðingum o.tíl., har eigarar, ið eru áhugaðir at stuðla aliarbeiðinum at menna stovnin av *Føroyska Rossinum*, á tryggan hátt kunnu lata sínar ryssur koma til ífolingar um summarið.
Á samsvarandi hátt verður miðað eftir, at Búnaðarstovan fær skipað umstøður á Heygsgarði, har tað skal bera til at lata ryssur av Føroyska Rossinum koma til ísáðingar.
Somuleiðis verður miðað eftir at skapa umstøður á Heygsgarði til at kvidna ryssur (surrogat møður) við gitnum eggum av *Føroyska Rossinum*.
Búnaðarstovan leggur árligar aliætlanir til rættis, sum alimiðstøðin síðani fyriskipar, í samstarvi við Felagið Føroysk Ross og við ryssuánarunum, og við tí fyri eygað at menna stovnin (arvafeingið og tal av rossum) av *Føroyska Rossinum*.
Í tann mun, at Búnaðarstovan eigur ryssur av *Føroyska Rossinum* (í styttri ella longri tíðarskeið), verður miðað eftir, at hesar taka virknan lut í aliarbeiðinum.
*Føroyska Rossið*, sum serstakt rossaslag, hevur longu víst seg at vera áhugavert fyri gransking í m.a. norðurlendskum høpi. Verður ein alimiðstøð skipað á Búnaðarstovuni, fer hetta ivaleyst at styrkja um møguleikan fyri víðari granskingarsamstarvi við m.a. Fróðskaparsetur Føroya og onnur norðurlendsk vísindalig samstørv, m.a. NordGen; og soleiðis styrkja um granskingargrundaða virksemið viðvíkjandi húsdjórum á Búnaðarstovuni.
**Onnur føroysk húsdjóasløg:**

Um flogfenaðsløgini, *Føroyska Gásin* og *Føroyska Dunnan*, somuleiðis verða tikin upp í skipaða varðveitingararbeiðið á alimiðstøðini, verður hetta ein enn størri fakligur styrkur.
Arvafeingið í føroyska seyðaslagnum, *Føroyski Seyðurin*, verður undir verandi umstøðum ikki mett sum hótt. Búnaðarstovan skipar tó fyri árligu Landsseyðasýningini í eini roynd at leggja dent á aling av so lýtaleysum seyði í Føroyum, sum gjørligt.
*Føroyska Neytið* var í 2018, eftir nágreiniligar arvafrøðikanningar, tíverri staðfest at vera farið fyri bakka sum egið neytaslag. Sambært tilráðing frá NordGen í 2019 varð tó avrátt at goyma tær íleguresti, ið stavaðu frá teimum kríatúrum, sum frammanundan kanningunum vórðu hildin at stava frá gamla slagnum. Hesar cryokonserveraðu restir eru varðveittar av serfrøðingum hjá NordGen, og Búnaðarstovan goymir tarvasáð, sum varð tikið fyri uml. 20 árum síðani. Umhvørvis- og vinnumálaráðið tók í desember 2019 undir við avgerðini.

Varðveitingararbeiðið umvegis eina alimiðstøð kann soleiðis viðvirka til at dugna øðrum geirum av víðkaða landbúnaðarhugtakinum; m.a. t.d. fleirbiti og albøting (optimering) av staðbundnum fóðri, landbúnaðarferðavinnu v.m.

## *Ílegugrunnur (biobanki):*

Búnaðarstovan (áður Royndarstøðin í Kollafirði) hevur síðani 2002 hildið eina goymslu av niðurfrystum (cryokonserveraðum) greðingasáði (spermatozoum). Sáðgoymslan er skipað í serstøkum dunkum til endamálið við flótandi køvievni í (-196º C), sum Búnaðarstovan hevur røkt øll árini.
Í hesi goymsluni eru strá við sáði í frá at kalla øllum greðingunum av *Føroyska Rossinum* frá ávikavist 2002 og 2004. Sáðtøkan varð á sinni framd í samstarvi við Felagið Føroysk Ross.
Tíverri er einki tvítak (dublikat) til av sáðgoymsluni fyri at tryggja seg móti misfaring. Ein slík tvígoymsla átti at verið skipað í samstarvi við NordGen.
Nevnt kann verða í hesum høpi, at NordGen fyrireikar avtalu við ávikavist Føroyar og Grønland um framtíðar samstarvsavtalur fyri viðkomandi arvafeingi úr londunum.
Frysta greðingasáðið varð eftirkannað fyri lívvirkni fyri fáum árum síðani, og sáðgóðskan varð av djóralækna staðfest at vera í lagi.
Búnaðarstovan miðar eftir at hava umstøður fyri framhaldandi sáðtøku frá greðingunum í stovninum av *Føroyska Rossinum*.
Búnaðarstovan miðar eftir at kunna fara undir tøku av eggum (oocytum) úr ryssum av *Føroyska Rossinum* og at skipa fyri gitnan og goymslu av hesum (t.v.s. cryokonservering av embryonum) í ílegugrunninum. Arbeiðið má fyrireikast, fyriskipast og fremjast í neyvum samstarvi við NordGen, og støða má eisini takast til, í hvønn mun arvafeingið eigur at latast í varðveitslu hjá NordGen.
Búnaðarstovan miðar eftir at hava dygdargóðar og dagførdar umstøður til álítandi frostgoymslu av arvafeinginum av *Føroyska Rossinum*.
Endamálið við ávikavist bæði sáðtøku og tøku og gitnan av eggum er at tryggja bæði støðuga varðveitslu, atgongd og gagnnýtslu til arvafeingið í stovninum. Búnaðarstovan skal umsita hesi rættindi og hava óskerdan ræðisrætt til at gagnnýta arvafeingið.
Miðað eigur at verða eftir, at tilfeingið í ílegugrunninum verður goymt í tvítøkum á tryggum staði; m.a. hjá NordGen, sum áður umrøtt.
Rakstur og røkt av einum ílegugrunni fyri *Føroyska Rossið* (eins og fyri hini gomlu føroysku húsdjórasløgini) má fyriskipast í tøttum samstarvi við fyrst og fremst NordGen, men somuleiðis við viðkomandi áhugapartar, t.d. Felagið Føroysk Ross.
Búnaðarstovan skipar fyri samstarvi við viðkomandi stovnar og felagsskapir v.m. (eins væl innlendis sum í útlondum), um verkætlanir, ið á ymsan hátt kunnu stuðla undir varðveitingararbeiðið fyri *Føroyska Rossið* og menningina av hesum rossastovni; og somuleiðis fyri hini gomlu føroysku húsdjórasløgini.

## *Skrásetingarskipan:*

búnaðarstovan

Felagið Føroysk Ross hevur síðani 1970-árini ført eitt skrásett yvirlit yvir tey ross, ið hoyra til serstaka stovnin: *Føroyska Rossið*. Talan er um neyvt yvirlit og um skjalfesta ættarbandsskrá, sum er framd í samstarvi við kanningarstovu á Sveriges Lantbruksuniversitet.
Hesi seinastu árini hevur Felagið Føroysk Ross fingið játtan á Løgtingsfíggjarlógini til at fíggja uppbygging av eini framkomnari teldutøkari skrásetingarskipan, nevnd Føroya Fongur, ið byggir á íslendska leistin WorldFengur.
Allur stovnurin av *Føroyska Rossinum* er nú skrásettur í Føroya Fongi. Tað er íslendska Ráðgjafarmiðstøð Landbúnaðarins [RML], ið eigur WorldFengur, og sum eisini hýsir Føroya Fongi.
Til tess at kunna verða skrásett í Føroya Fongi krevst, at rossið verður eyðmerkt við viðurkendari erflís/mikrokipp (elektroniskt chip-merki), og at viðurkend íleguroyndarkanning ella onnur viðurkend tøkni staðfestur ættarbandið í ávikavist bæði faðir- og móðirlegg at vera heimahoyrandi í hesi skránni.
Tað er eitt ynski frá Felagnum Føroysk Ross, at Búnaðarstovan yvirtekur arbeiðsuppgávuna at skula halda skrásetingarskipanina (Føroya Fongur) dagførda og at umsita raksturin av hesi.
Somuleiðis er tað ynski frá Felagnum Føroysk Ross, at Búnaðarstovan átekur sær arbeiðsuppgávuna at stíla fyri árligari eyðmerking av nýfolaðum fylum; t.v.s. seta erflís í hesi, taka íleguroyndarsýni av teimum, og at fáa sýnini send til starvsstovukanningar.
Mælt verður til, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við, at Búnaðarstovan fær ræðisrættin yvir skrásetingarskipanini *Føroya Fongur* og tekur við øllum rakstrarskyldum av hesi, eins og, at Búnaðarstovan somuleiðis fær ábyrgd av uppgávunum at stíla fyri nøktandi eyðmerking av rossunum í stovninum og at borga fyri trúvirðinum av slagnum *Føroyska Rossið*.

## *Miðvís aling:*

Eftir leiðbeining frá Nordisk Genbank Husdyr (nú NordGen) hevur síðani 1990-árini verði miðað eftir eini stovnsstødd á í minsta lagi uml. 200 burðarførum kríatúrum av *Føroyska Rossinum*, áðrenn nøkur miðvís úrvalsætlan verður løgd fyri aliarbeiðið víðari frameftir. Grundað á nútímans arvafrøðivitan hevur NordGen tó hækkað talið til 300 kríatúr í einum dagførdum tilmæli saman við FAO (landbúnaðar- og matvørustovnurin hjá ST). Hetta merkir, at øll rossini, undantikið tey við beinleiðis viðføddum brekum ella lýtum, eiga at vera gagnnýtt í alingini, har ið hetta ber til, og har tað ikki eru eyðsýnd onnur ross í at velja.
Av tí, at stovnurin av *Føroyska Rossinum* byggir á arvaeginleikarnar frá einans uml. 5 rossum, ið vórðu bjargað frá týning í 1960-árunum, er breiddin í arvafeinginum hjá stovninum sera avmarkað. Tí er alneyðugt støðugt at virka fyri so skynsamari aling, sum gjørligt; bæði við atliti til støðuna at umganga innannøring (inbreeding), men somuleiðis fyri at arbeiða fram ímóti at fremja sokallaða "outbreeding" í mest møguligan mun (t.v.s. at albøta um arvafeingið í stovninum).
Felagið Føroysk Ross og Búnaðarstovan eru sannførd um, at ein alimiðstøð, sí omanfyri, er ein fortreyt fyri at skipa eitt miðvíst aliarbeiði, sum kann flyta varðveitingararbeiðið av *Føroyska Rossinum* longur fram á leið og í eina tryggari legu.
Til at stíla fyri einum miðvísum aliarbeiði ynskja Felagið Føroysk Ross og Búnaðarstovan, at hetta arbeiðið formliga verður lagt til Búnaðarstovuna at umsita í skipaðum karmum; sum partur av tí landbúnaðarfakligu ábyrgdini av at varðveita serføroysku húsdjórasløgini, ið táverandi Umhvørvis- og vinnumálaráðið legði til stovnin í januar 2021.
Miðað eigur at vera eftir, at aliætlanir verða lagdar á hvørjum ári, og somikið tíðliga á árinum, at sum mest fæst burturúr sumrinum.
NordGen veitir telduforrit at nýta í aliarbeiðinum, nevnt EVA, sum gevur møguleikar fyri at tilrættisleggja arvafrøðiliga grundaðar aliætlanir; soleiðis at stevnumiðini, lýst omanfyri, kunnu verða nádd so munadygt, sum møguligt.
Skipanin Føroya Fongur veitir somuleiðis (móti ávísum gjaldi) umfatandi arvafrøðiligt dátutilfar at nýta í tilrættalegging av aliarbeiðinum (t.d. BLUP analysur grundaðar á viðurkend alimát).

búnaðarstovan

Somuleiðis eru serfrøðingar hjá NordGen tøkir til ráðgeving, hjálp og vegleiðing í øllum alispurningum viðvíkjandi *Føroyska Rossinum*.

## *Íverksetanarætlan:*

Í syðra endanum av fjósinum á Búnaðarstovuni verður skipaður ein greðingastallur við uml. 13 góðkendum rossabingum (DK = boks) til á leið 14 - 16 greðingar. Talið á greðingum av *Føroyska Rossinum* skal samsvara við fakligu ráðgevingina fyri at fevna um alt týðandi arvafeingi í stovninum og fyri at kunna menna alingina í bestan mun.
Í syðra túninum, millum fjósið og køstarnar, verður ein flytbarur rennigarður (DK= løbegård) á uml. 160 $m^2$ settur upp, soleiðis at greðingarnir kunnu vera uttandura eftir tørvi í vetrarhálvuni.
Rossarøktari við formligum førleikum á økinum verður settur í starv á Búnaðarstovuni. Høvuðsuppgávan verður dagliga røktin og venjingin av rossunum, verkligi parturin av skipaða aliarbeiðinum, skrásetingaruppgávur, røkt av ílegugrunni, ráðgeving og frálæra v.m.
Skipað verða uml. 8 tryggar og vælegnaðar girðingar/rossatraðir (DK = fold) í Heygshaga, hvør á uml. >1 ha í vídd (og uml. 500 - 600 lm av hegni), aftrat teimum beitisøkjum, ið longu eru framd, har greðingar, og ryssur sum koma til ífolingar, kunnu ganga á beiti saman í summarhálvuni.
Hesar rossatraðir kunnu somuleiðis gagnnýtast sum beitilendi í sambandi við varðveitingararbeiðið av gomlu føroysku flogfenaðsløgunum (*"Føroyska Dunnan"* og *"Føroyska Gásin"*), ið somuleiðis hava ítøkiligan tørv á einum skipaðum varðveitingararbeiði.
Rossatraðirnar kunnu somuleiðis til aðrar árstíðir gagna málrættaðari seyðaaling.




Flutningsvognur (rossavognur - kríatúrsvognur) og onnur viðkomandi útgerð verður keypt til Búnaðarstovuna.
Útgerð verður fingin til vega at turka nóg mikið av dygdargóðum turrum hoyggi til rossahaldið.
Útgerð til sáðtøku, ísáðing, gitnan o.tíl. aliarbeiði verður fingin til vega. Avtala verður gjørd við uttanhýsis djóralækna um førleikamenning til tess at kunna átaka sær arbeiðið við hesum serstøku pørtum av aliarbeiðinum í samstarvi við Búnaðarstovuna.

## *Fíggjarligt vavi:*

Verður ein alimiðstøð eftir hesum leisti skipað, kann ein partur av árligu rakstrarútreiðslunum fíggjast við samsvarandi sparingum í árliga landbúnaðarstuðlinum, sum nú verður veittur til endamálið. Hetta letur seg gera, tí alimiðstøðin m.a. vil loysa privatpersónar frá núverandi tungu byrðuni av at hjálpa til við at halda ein greðingastovn tøkan v.m.

**Íløgur:**

Rossabing (DK = boks): uml. 10 stk. á uml. kr. 15.000 pr. stk. og uml. 3 stk. á kr. 20.000; íalt uml. kr. 210 tús. (brukstíð uml. 30 ár).

Liggjumáttir: uml. 18 stk. á uml. kr. 7.000 pr. stk.; íalt uml. kr. 126 tús. (brúkstíð uml. 10 ár).

Nýtt gólv: gamla rimagólvið úr betongi frá 1980-árunum er uppslitið, og gólvið má tí endurnýggjast. Talan er um uml. 155 $m^2$ at skifta út við nýmótans rimagólv. Mett íløga íalt kr. 175 tús. [arbeitt verður við at kanna hetta nærri] (brúkstíð uml. 30 ár).

Nýtt skavianlegg/reinsianlegg í flórin: gamla skavianleggið frá 1980-árunum er uppslitið, og má tí endurnýggjast. Mett íløga íalt kr. 150 tús. [arbeitt verður við at kanna hetta nærri] (brúkstíð uml. 30 ár).

Flutningsvognur: uml. kr. 125 tús. (brúkstíð uml. 20 ár).

Førleikamenning av djóralækna: mettur kostnaður uml. kr. 75 tús. Skotið verður upp at fíggja hetta av stuðulsjáttanini til føroysk húsdjór.

Útgerð til sáðtøku, ísáðing,  gitnan o.tíl. aliarbeiði: mettur kostnaður uml. kr. 60 tús. Skotið verður upp at fíggja hetta av stuðulsjáttanini til føroysk húsdjór.

Venjingarútgerð: mettur kostnaður íalt uml. kr. 45 tús. yvir 2 – 3 ár.

Rossatraðir: Hvør trøð á uml. >1 ha; hegnarbeiði uml. kr. 150 tús., harumframt lendisarbeiði á uml. kr. 150 tús.; íalt uml. kr. 300 tús. pr. stk. (brúkstíð uml. 30 ár).

Mælt verður til at gagnnýta markaðu játtanina sbrt. áseting í § 6c, stk. 2, í Ll. nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, til íløgurnar í hesi verkætlanini; har uml. kr. 836 tús. eru tøkar til endamálið. Harnæst verður skotið upp at fíggja partar av hesi íløguni við sparingum, ið kunnu fremjast á stuðulsjáttanini til føroysk húsdjór yvir nøkur ár. Somuleiðis ber til at gagnnýta av innistandandi upphædd sbrt. § 2, í Ll. nr. 84 frá 16. mai 2022 um at taka festið Heygsgarð úr festiskipanini.

Soleiðis eigur at bera til at fremja íløgurnar í verkætlanina uttan at hesar tyngja landskassan.

Hoyturkianlegg: til hóskandi útgerð er fingin til vega (t.v.s. er ment til endamálið), verður neyðugt at keypa hoyggj til at geva saman við súrhoynum; sí upphædd á rakstrinum.

Búnaðarstovan arbeiðir, saman við øðrum, við eini verkætlan um at menna eina burðardygga hoyturkiskipan til at gagnnýta føroyskt gras sum dygdargott hoyggj. Mettur fíggingartørvur er í fyrstu syftu uml. kr. 750 tús. Av tí at verkætlanin er somikið kostnaðarmikil, at rakstrarjáttanin til stovnin ikki megnar at fíggja hana, arbeiðir Búnaðarstovan við at finna uttanhýsis fígging til verkætlanina.

**Árligar rakstrarútreiðslur:**

Lønarútreiðslur - rossarøktari og onnur hjálp: mettur kostnaður uml. kr. 450 tús.

Rennigarður: tilfarið til garðin er í høvuðsheitum longu tøkt á Búnaðarstovuni og væntast at halda eini 8 - 10 ár aftrat. Árligi raksturin verður tí uml. 16 $m^3$ av 0 - 8 mm tilfari úr Hundsáarbotni á asfalttúnið; íalt uml. kr. 4,5 tús.

Hoyggj: kostnaður uml. kr. 86 tús.

Útreiðslurnar til hoyggj fella at kalla burtur, tá ein nøktandi hoyturkiskipan er fingin til gagnnýtslu av egnum stráfóðri.

Kraftfóður/kostískoyti/djóralækni/djóratannlækni/hóvsmiður/stroyggj: kostnaður uml. kr. 70 tús.

Føroya Fongur [RML og SLU v.m.]: kostnaður uml. kr. 100 tús.

Samanumtikið má tí metast, at árligu rakstrarútreiðslurnar av alimiðstøðini v.m. gerast uml. kr. 710 tús. Viðmerkjast skal, at í 2021 og í 2022 vórðu rindaðar ávikavist kr. 150 tús. og kr. 170 tús. í studningi til hald av greðingum. Stuðulsupphæddin hevði verði spard við skipan av eini alimiðstøð.

Aðrar útreiðslur enn tær, ið eru nevndar í hesum viðfangi, verða mettar sum partur av tí vanliga rakstrinum hjá Búnaðarstovuni.

***Eftirskrift:***

Felagið Føroysk Ross hevur strongt á myndugleikarnar um at fáa í lag neyðug loyvi og umstøður til útflutning av *Føroyska Rossinum*, eitt nú til Danmarkar. Grundgevingarnar eru m.a., at hetta hevði víðkað munandi um møguleikarnar at økt um stovnin; og soleiðis viðvirkað til at tryggja stovnsstøddina og varðveitingararbeiðið munandi betur.

Búnaðarstovan skilur ynski felagsins, men skal tó vísa á, at ein møguligur útflutningur av alirossum av *Føroyska Rossinum* má skipast undir skynsomum, kønum og tryggum kørmum, soleiðis at arvafeingið í stovninum ikki verður fyri nøkrum vanbýti her í Føroyum. Búnaðarstovan er altíð fús at umrøða hesi viðurskifti nærri.

NordGen hevur, saman við Búnaðarstovuni og Felagnum Føroysk Ross, gjørt upprit til eina tilbúgvingarætlan (EN: Action Plan) fyri tað Føroyska Rossið.

Tilbúgvingarætlanin tekur støði í vísindaligu greinini "Faroese Horse: Population status & conservation possibilities (2017)", sum byggir á altjóða viðurkendu vegleiðingarnar hjá FAO, um *in vivo* varðveitslu av ílegutilfeingi frá kríatúrum (2013), umframt viðkomandi dagførdum upplýsingum frá Búnaðarstovuni og Felagnum Føroysk Ross.

Tilbúgvingarætlanin verður løgd fram fyri stýrið í NordGen um mánarskiftið maj/juni í ár.

Eftir, at tilbúgvingarætlanini er almannakunngjørd, verður hon at nýta sum amboð hjá NordGen, Búnaðarstovuni og Felagnum Føroysk Ross í varðveitingararbeiðinum av Føroyska Rossinum.

Vinaliga,

**Tróndur Gilli Leivsson**